# Rættiligt grindarok

**Fyrrapartin í gjár fann ein útróðrarbátur úr Leirvík eina grind nakað suður úr einum staði teir nevna í Skorini.**

GRIND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað vísti seg kortini, at grindin og springararnir gekk í fleiri bólkum. Og tá samanum kom løgdu tveir bólkar beinini – annar í Klaksvík og hin á Gøtusandi.

Tað gekk skjótt við sjálvum drápinum. Í Gøtu løgdu 28 hvalir og sjey springarar beinini.

Frá løgregluni í Klaksvík verður upplýst, at grindin sum legði beinini har var 24 hval.

Tá alt var skorið upp og nýtt sundur vóru íalt 471 drápspartar – av hesum fóru teir 336 partarnir til bátarnar og hinir 135 til grindamenn.

Íalt var drápsparturin í Klaksvík 0,4 skinn.

Hetta kom helst væl við hjá klaksvíkingum. Sambært eini kanning millum lesararnar á heimasíðuni hjá Norðlýsinum var fesk grind á borðinum hjá fjórða hvørjum teirra.



*Grindin á sandinum í Syðrugøtu var partur av einum bólki, sum legði beinini í Klaksvík* *Mynd: Kaj*



## Kom, skar og át



**Hvalvík:** Meðan gøtufólk og klaksvíkingar tókust við at drepa grind, lá ein einsamallur springari og bardist fyri lívinum í Hvalvík seinnapartin í gjár.

Hann var komin heldur nær landi, - so nær, at hann hvørki slapp út aftur ella inn á land.

Soleiðis lá hann og stríddist í ein góðan tíma, áðrenn ein maður tók seg um reiggj, gekk út til springaran, skar hann á háls og dró hann á land.

Her var so bara tann eini grindaparturin, og helst endaði tvøstið á onkrari pannu í gjárkvøldið.

**sb.**

*Nakað av fólki var til hetta einsamalla drápið. Talan var kortini bert um tann eina grindapartin*
*Mynd: Snorri Brend*